# 15 næmingar í Adventistaskúlan



*Heini Edvardsson er møttur til fyrsta skúladag. Fyrsta bókin verður her latin honum, men skúlagongdin byrjar ikki av álvara fyrrenn í komandi vikuna. Hesar komandi dagarnar verður m.a. ferðslufrálæra á skránni*

**Fyrrapartin í gjár møtti 11 dreingir og fýra gentur í Adventistaskúlanum til sín fyrsta skúladag. Hesa fyrstu vikuna verður ikki vanlig skúlagongd**

FYRSTI SKÚLADAGUR
*Snorri Brend*

**Havn:** Tey vóru øgiliga spent. Og øgiliga tigandi, hesi 15 børnini, sum kl. 11 møttu í Adventistaskúlanum.

Um tað er "stilli áðrenn ódn", skal vera ósagt, men tað hoyrdist ikki nakrastaðni, at 15 næmingar og foreldur teirra vóru savnaði í kjallaranum undir Adventistakirkjuni.

Á talvuni stóðu tey fimtan nøvnini, og nú skuldu tey so, ein fyri og annar eftir, upp á talvuna at viska út sítt egna navn.

Fyrsti næmingurin, Teitur hevði eina heldur trupla uppgávu: Í fyrsta lagi vóru 15 nøvn at velja millum, og í øðrum lagi vóru tveir við navninum Teitur í flokkinum.

Hesin – við navninum Teitur A. - fann tó skjótt fram á sítt navn, og so var tað strikað av talvuni.

**Eldri vinir**

Í hesum 1. flokkinum eru fýra næmingar, sum ikki eiga eldri systkin í skúlum. Og tí er hetta ein serstakur dagur fyri tey og fyri foreldur teirra.

Við stuttu samkomuna fingu børnini vístar bøkurnar sum tey skulu brúka hetta komandi árið, m.a. eina spildurnýggja roknibók, sum á fyrsta sinni skal takast í nýtslu í ár.

Hesa fyrstu vikuna verður tó ikki nógv rokning á skránni, men tey fara at leggja dent á m.a. frálæru í ferðslu. Men í næstu viku verður so lagt til brots av álvara.

Tá ein kemur soleiðis nýggjur í ein 1. flokk so kann tað mangan tykjast einsligt, og trupult kann vera at finna onkran at spæla við.

Men skúlin hevur her ta skipan at allir næmingarnir í 1. flokki hava ein vin, sum gongur í 7. flokki.

- So hevur tú ongan at spæla við ella tú keðir teg í fríkorterinum, so kanst tú altíð fara til vinin í 7. flokki, fingu børnini at vita henda fyrsta skúladagin.

Umframt hesar 15 næmingarnar í 1. flokki, so eru 95 aðrir næmingar í skúlanum hetta komandi skúlaárið - 110 íalt.

## 700 næmingar í 1. flokk

Í gjár byrjaðu skúlarnir aftur kring landið. Íalt fóru 696 næmingar í skúla á fyrsta sinni.

Flestu næmingarnir fara í Hoyvíkar skúla, har ikki færri enn 51 næmingar skulu í 1. flokk. Næstur hesum skúla koma síðani hinir báðir stóru skúlarnir í Havn - Venjingarskúlan og Sankta Frans skúli - har 48 næmingar skulu í skúlan á fyrsta sinni. 40 næmingar fara í Eysturskúlan.

Í Runavík er eisini eitt stórt tal av næmingum, sum skulu í 1. flokk. Har byrja ikki færri enn 43 næmingar í 1. flokki, meðan 74 næmingar fara í teir báðar skúlarnar í Klaksvík – Skúlan við Ósánna og skúlan á Ziskatrøð.

Eysturskúlin er størsti skúlin í landinum við íalt 603 næmingum. Í hølunum á honum kemur Kommunuskúlin við 9 færri næmingum.

*sb.*

## Stórur 1. flokkur í Hvalvík

**Hvalvík:** Skúlin í Hvalvík økist í stórum og í ár byrjar ein sera stórur 1. flokkur í skúlanum.

Við skúlaársbyrjan í 2003 vóru 37 næmingar í skúlanum. Nú er talið farið upp um 50, ja er komið heilt uppá 56 næmingar hetta skúlaárið.

Í ár fara nevniliga 11 børn í 1. flokk, og í hinum flokkunum, fram til 7., eru íalt 45 næmingar. Tá næmingarnir fara víðari í framhaldsdeildina verður farið í Felagsskúlan á Oyrarbakka.

Aslaug Olsen er skúlaleiðari í Hvalvík.

*sb.*

## Fyrsti skúladagur í Skótahúsinum

Kollafjørður: Skúlin í Kollafirði er ikki liðugt umbygdur, nú skúlin skuldi byrja aftur eftir summarsteðgin ígjár. Tí máttu aðrar loysnir finnast.

Ætlanin var upprunaliga at flokkarnir við Kollfjarðar Skúla skuldu byrja aftur fyrrapartin í gjár.

Men tað verður kortini bert teir um 15 næmingarnir sum á fyrsta sinni skulu í skúla, sum veruliga sluppu í skúla í gjár.

Í lýsing í Kringvarpinum um vikuskiftið boðaði nevniliga leiðslan á skúlanum frá, at tey bert tóku ímóti 1. flokki ígjár.

Næmingarnir í hinum flokkunum máttu tá bara geva tol og bíða eftir nærri boðum.

Lýsingin segði frá, at 1. flokkarnir skulu møta kl. 13 í Skótahúsinum. Lærararnir skulu møta kl. 8 á sama staði.

Framyvir verður skúlagongdin í Kollafirði í ymiskum støðum kring um í bygdini, inntil skúlin verður liðugt umbygdur í næstum.

*sb.*

# Fýra skúlar uttan næmingar

**Í dag og í morgin fara 7.590 næmingar í føroysku skúlarnar, men í fýra teirra er eingin skúlagongd komandi skúlaár**

SKÚLABYRJAN
*Snorri Brend*

Ein av skúlunum, har eingin skúlagongd verður í ár, er skúlin á Leiti.

Soleiðis sum støðan gjørdist í ár, var bert tann eini næmingurin, sum skuldi fara í skúlan.

Sum skilst, so var hesin eini næmingurin komin nakað væl upp í flokkum. Tí varð avgjørt at flyta henda til Vágs skúla, ístaðin fyri at vera einasti næmingur á Leiti.

Av tí at heldur eingin næmingur var til 1. flokk, verður eingin skúlagongd á Leiti skúlaárið 2005/2006.

Og spurningurin er so, nær – og um – hetta yvirhøvur verður aftur.

Hini støðini, har eingir næmingar eru, men har skúlabygningur hóast alt er, eru í Dímun, Norðradali og í Gásadali.

# Eingin skúlagongd hóast næmingar eru

**Í ávísum skúlum kring landið er eingin skúlagongd, tí eingi børn í skúlaaldri eru í bygdini longur. Men so er ikki í Norðradali: Har eru bæði skúli og næmingar, men kortini er eingin skúlagongd**

SKÚLI
*Snorri Brend*

**Norðradalur:** Tað var fyrst í 90'árunum at seinastu næmingarnir gingu í skúlanum í Norðradali. Síðani hava teir gingið í Eysturskúlanum í Havn.

Síðani skúlagongdin steðgaði í bygdini, hava foreldrini tikið sær av at koyra næmingarnar í skúla í Havn fyri ávísa samsýning.

Hetta seinasta skúlaárið hava tríggir næmingar verið í Norðradali: Tvær gentur í 5. og 7. flokki og ein drongur, sum hevur verið knýttur at Sernámsdeplinum í Havn.

Hetta komandi skúlaárið, sum byrjar í morgin, hevði so bert verið tann eini næmingurin í 6. flokki, tí hin gentan nú er farin í framhaldsdeild í Havn.

Tí hevði bert tann eini skúlanæmingurin verið við skúlan hetta komandi skúlaárið, um so var at skúlagongd var í Norðradali. Men tað er tað so ikki, og tað eru fleiri heldur hørm um. Og tey hava eisini gjørt vart við hetta við Tórshavnar kommunu fyri nøkrum árum síðani.

- Tað hevði sjálvandi verið tað optimala – og ólíkari hentari - at vit bara kundu latið næmingarnar gingið í skúla her í bygdini.

- Men tað tykist ikki vera politiskur vilji fyri hesum, og tí verða næmingarnir ístaðin koyrdir til Havnar í skúla hvønn morgun, sigur Ólavur Reinert í Norðradali, sum als ikki eru samdur í greinini um tómu skúlarnar.

Í bygdini eru børn undir skúlaaldur, men tað verða nøkur ár enn, áðrenn tey fara í skúla. Ístaðin verður so skúlin brúktur til eitt nú gudstænastur.

Í grannabygdini, Syðradali var eisini undirvísing givin fyri árum síðani. Her var tó ikki talan um skúlabygning, men um undirvísingarhøli í einum sethúsum.